# Oddfríður Gregersen 80 ár



*Hjørdis og Oddfríður*

Í dag fríggjadagin 1. februar verður ein kendur gøtumaður, Oddfríður Gregersen úr Syðrugøtu, 80 ár.

Oddfríður er sonur Sáru og Jóan Paula Gregersen.

Tey bæði áttu børnini tvíburarnar Ásu og Per f. 1923, Leivur f. 1926, Oddfríður f. 1928 og Gunnleyg f. 1931. Ása og Per eru deyð. Leivur býr í Danmark og Gunnleyg í Syðrugøtu.

Jóan Pauli var úr Syðrugøtu, sonur Petru f. Husgaard og Óla Gregersen, sum vóru megnarfólk. Tey fingu 11 børn, og teirra nógvu eftirkomarar hava merkt nógv fyri Gøtu og Føroyar sum heild. Hetta kundi verið ein áhugaverd søga, sum tó ikki pláss er fyri her.

Sára var dóttir Onnu Malenu f. Isaksen, vanliga nevnd Lena og Líggjas Simonsen úr Jørundstovu í Norðragøtu. Lena doyði, tá ið børnini vóru smá. Tey vóru trý systkin. Umframt Sáru var tað Sigrid og Jens, sum bæði endaðu í Havn. Sigrid giftist við Des Arge og (Bomm)Jens við Magnhild í Horni.

Genturnar máttu taka húsið uppá seg. Men tað, at mamman var deyð forðaði ikki fyri, at Leon, systkinabarn tey trý systkini, kom at vaksa upp har.

### Skapti søgu í Gøtu longu sum nýføðingur

Oddfríður kom longu sum nýføðingur at skapa søgu í Gøtu. Hann var nevniliga fyrsta barn í Gøtu, sum varð doypt eftir føroyskum rituali. Jóan Pauli var tjóðskaparsinnaður og hevði søkt próstin Jákup Dahl um loyvi til tess. Hetta skuldi játtast av hægri myndugleikum, og tað varð tað eisini. Prósturin kom sjálvur norður at doypa Oddfríð. Enn hevur Oddfríður eina gummu eftir á lívi, og er tað 95 ára gamla Petra Samuelsen í Horni í Havn, sum er systkinabarn hansara.

Í sama vatni varð Elsa Jacobsen, fyrrverandi trúboðari í Etiopia, doypt. Hon var ikki umfatað av umsóknini hjá Jóan Paula. Men pápi Elsu, Eliesar í Tjørnustovu, spurdi Dahl, um hetta kortini kundi bera til. Próstur svaraði, at formelt hevði hann ikki loyvi til tess, men hann tók kjansin kortini, og tað gjørdist eingin trupulleiki av tí heldur.

Oddfríður hevur havt ta vanligu yrkisleiðina hjá bygdardreingjum tá í tíðini. Hann fór til skips, var síðan við skúlaskipi, tók stýrimansprógv í Havn í 1952 og skipsføraraprógv í Keypmannahavn í 1953.

Eitt skifti sigldi hann við donskum skipum. Minnist at hann førdi Coraliu, sum var sandbátur hjá Jóan Paula. Hon var kend fyri minniligu hendingina á Kappanum við Blithsome í 1935.

Í 1964 tók Oddfríður við sum stjóri á Fiskavirkinum í Gøtu, eftir at Jóan Pauli var deyður.

### Søgan hjá Oddfríð knýtt at vinnulívinum í Gøtu

Søgan hjá Oddfríð og hansara ætt er neyvt knýtt at søguni hjá vinnulívinum í Gøtu. Í síni tíð var tað pápin Jóan Pauli, sum gekk á odda.

Hetta byrjaði við Fiskavirkinum seinast í 20-unum, har Jóan Pauli skjótt gjørdist stjóri. Hetta var nútímans turkihús og eitt sera stórt arbeiðspláss í bygdini.

Nýhugsan var eisini nógv av. Fiskavirkið gjørdist eitt tað fyrsta flakavirki í landinum í 50-unum, og var hetta enn eitt frambrot. Fyrsti arbeiðsformaður var annars Haldgrim Gregersen, sum beint hevur fylt 75 ár.

Jóan Pauli doyði lutfalsliga ungur, 66 ára gamal. Tá tók Oddfríður við, og hann helt áfram við sama ágrýtni. Oddfríður hevur eins og pápin gingið á odda á mongum økjum.

Jóan Pauli byrjaði við sildini, men virking av sild á landi gjørdist ein stórur partur av vinnuni í Gøtu í 60-unum, eftir at Oddfríður hevði tikið við.

Byrjað varð á keiuni í Norðragøtu við Hellu Meinhard (Jensen) sum arbeiðsformanni, og har fekk eg sjálvur manga daglønina. Tað sá so gott út við sildini, at hetta førdi til byggingina av sildavirkinum Harenga fyrst í 70-unum. Hetta var fyrsta virki av hesum slag í Føroyum. Tað gekk gott til sildin hvarv seinni í 70-unum.

Hetta var ein baksláttur og virkið stóð stilt eina tíð. Ikki fullu teir tó í fátt. Teir byrjaðu so smátt við flakavinnu, og í dag er Gøtu Fiskavirki eitt tað best rikna flakavirkið í landinum.

Seinni er so laksur komin afturat, sum eisini hevur givið nógv virksemi. Her er so mikið væl fyristaðið, at teir vóru annað av teimumm tveimum virkjunum, sum sluppu undan laksakreppuni fyri nøkrum árum uttan at fara á húsagang. Nú gongur tað aftur væl.

### Sleptu sær av við skipini

Í nógv ár høvdu teir eisini skip. Var sjálvur í 1966 við Ingrid Pau, sum var eitt av teimum fyrstu kraftblokkaskipunum. Men munur er á stødd. Ingrid Pau tók 120 tons, meðan dagsins skip á hesi veiðu taka meira enn 3.000 tons! Onnur skip hava verið: Saturn, sum var kraftblokkaskip og tvey Sporið, tað seinna av teimum fiskaði ídnaðarfisk.

Seinni komu teir eftir, at teir skuldu halda seg til fiskavirking á landi og einki annað. Hetta hevur nakað við hugskotið aftanfyri uppboðssøluna at gera.

Oddfríður var ein av teimum fyrstu, sum tóku stig at fáa uppboðssølu av fiski. Grundarlagið fyri tí var eisini, at flakavirkini á eini uppboðssølu skuldu kunna keypa júst tann fisk, sum teir hava brúk fyri til at fáa ta mest lønsomu fram-



*Sáttmáli verður undirskrivaður. Poul Mohr, Oddfríður og Carl tykjast at vera væl nøgdir*



*Ingeborg Vinther og Oddfríður í einrúmi. Tá loysnaði*